Løgtingsformaðurin
Løgtingið

Á løgtingi, 10. Januar 2022

**Ískoytisgrundgevingar til krav um kanningarstjóra viðvíkjandi fiskivinnufyrisitingini**

Á fundi við undirritaðu 6.januar 2022 ynskti løgtingsformaðurin nakrar útgreinandi grundgevingar fyri kravinum um kanningarstjóra at kann lógargrundarlagið og fyrisitingarligu avgerðirnar í teimum mest týðandi avgerðunum um útluting av fiski- og veiðirættindum í føroysku fiskivinnufyrisitingini frá 2010 til í dag. Tað verður hervið gjørt vísandi til teir tríggjar lutirnar og tíðarskeiðini í kravi okkara um kanningarstjóra og kanningarsetning:

1. **<u>Viðvíkjandi lógargrundarlagnum og fyrisitingarligu avgerðunum at luta út nýggj makrelrættindi frá 2010 og frameftir undir táverandi lóg um vinnuligan fiskiskap:</u>**
   - Eftir at Føroyar ásettu sær eina egna og munandi hækkaða makrelkvotu frá 2010 og frameftir, er støðugt reistur ivi um lógargrundarlagið og ítøkiligur illgruni reistur um fyristingarligu avgerðirnar, tá ið makrelrættindi vórðu býtt út. Fyrst í 2010 við landsstýrismansins avgerð um at útskriva nýggja makrelkvotu í fiskiloyvum. Síðani í 2011 við eini fyribils lóggávu, einum politiskum semjuskjali og við kunngerð. Og síðani í 2012 við kunngerð, har avgerðirnar um býtið vórðu viðgjørdar í einum sonevndum "makrelbólki".
   - Í sending í seks pørtum í KVF í 2020 reistu fleiri persónar við innliti, sum vórðu virknir í fiskivinnuni tá, iva um sjálvt lógargrundarlagið í táverandi lóg um vinnnuligan fiskiskap §9. Hesin illgruni er ongantíð kannaður ella viðgjørdur nærri. Tá makrelurin broytti Føroyar | Kringvarp Føroya (kvf.fo)
   - Í 2010 kærdi tingmaðurin Tórbjørn Jacobsen um ivasamt lógargrundarlag og fyristingarligu avgerðirnar fyri makrelbýtinum í 2010: Nevndarmál (logting.fo)
   - Og í 2012 kærdi Høgni Hoydal, tingmaður, um ivasamt lógargrundarlag og fyrisitingarligu avgerðirnar í makrelbýtinum. Kæran varð tó seinni afturtikin, tí Løgtingsins Umboðsmaður tók málið upp eftir kæru frá privatpersóni. Nevndarmál (logting.fo)
   - Í svarunum frá Fiskimálaráðnum til tær báðar kærurnar í 2010 og í 2012, verður víst til tvær heilt ymiskar tulkingar av lógargrundarlagnum og lógini um vinnuligan fiskiskap.
   - Táverandi landsstýrismaður segði sjálvur alment, at skjalprógv og grundgevingar vantaðu í avgerðunum um makrelbýti í 2012. Atfinningar ávirkaðu makrelbýtið í fjør | Kringvarp Føroya (kvf.fo)
   - Alt hetta reisir ein grundaðan illgruna um, at lógargrundarlagið og fyrisitingin hava ikki verið í lagi.

2. **Viðvíkjandi tíðarskeiðinum undir lógini um sjófeingi í 2018 og 2019:**
   - Í viðgerðini av útluting av uppsjóvarrættindum í 2018 og 2019, hevur ferð eftir ferð verið ført fram á tingi og í almenninginum, at landsstýrismaðurin hevði "givið" 85% av øllum rættindum til teir stóru aktørarnar. Hetta hendi so seint sum undir løgtingsviðgerðunum av broyting í lóg um sjófeingi í november og desember 2021: Mál (logting.fo)
   - Her vóru sera álvarsligar ákærur og illgruni førd fram á tingi um fyrisitingina hjá landsstýrismanninum í 2018 og 2019.
   - Hartil varð reistur ítøkiligur illgruni um skeiva og ósakliga fyrisiting hjá landsstýrismanninum í sambandi við útluting av menningarkvotum í 2018 og 2019. M.a. varð stjórin á størsta uppsjóvarvirkinum í Føroyum alment í miðlunum við ítøkiligum illgruna: Tey standa púra spyrjandi á Varðanum Pelagic | Kringvarp Føroya (kvf.fo)
   - Harumframt komu fleiri illgrunar alment fram á kringvarpaðum kjakfundum – m.a. á fiskivinnutinginum í Klaksvík í februar 2019 – um ósakliga fyrisiting: Stakar sendingar - sjónvarp | Kringvarp Føroya (kvf.fo)
   - Somuleiðis kærdu fleiri umsøkjarar um viðgerðina og avgerðirnar um menningarkvotur í 2018 og 2019 – og Løgtingið hevur ongantíð útint nakað eftirlit við hesum illgrunum og ákærum um ólógliga og ósakliga fyrisiting.

3. **Viðvíkjandi lógargrundarlagnum og avgerðunum undir seinnu lógini um sjófeingi frá 2020 og fram:**
   - Ítøkiligur illgruni um lógargrundarlagið og fyrsitingarligu avgerðirnar er um avgerðirnar um útluting av kvotum til vinnuligar royndir og verkætlanir, ískoytiskvotur og seinni til ítøkiligt skipakeyp, m.a. av hesum orsøkum:
   - Landsstýrismaðurin hevur skrivliga svarað, at hann sum landsstýrismaður kolldømdi ítøkiligu tilmælini frá umsitingini um at luta kvotur út til vinnuligar royndir og verkætlanir í 2020. Ístaðin skjeyt hann upp at flyta kvoturnar til 2021 og at broyta lógina, so at aðrir umsøkjarar enn teir, sum vórðu tilmæltir í 2020, fingu kvoturnar: Mál (logting.fo)
   - Landsstýrismaðurin hevur skrivliga svarað, at hann í fleiri førum kolldømdi tilmælini til avgerð frá umsitingini í útluting av uppsjóvarkvotum til vinnuligar royndir og verkætlanir, ískoytiskvotur, ítøkiligt skipakeyp v.m. Mál (logting.fo)
   - Ein røð av kærum um fyrisitingarligu avgerðirnar, og um vantandi játtanir til umbønir um alment innlit og partsinnlit eru sendar til Fiskimálaráðið í hesum málum í 2021, og umsøkjarar hava alment víst á samskifti við samgongufólk og trýst á landsstýrismannin.
   - Fiskimálaráðið: Avgerðin um kvotuútlutan stendur við | Kringvarp Føroya (kvf.fo)
   - Fleiri ætlaðu at keypa sama skip, um teir fingu kvotu | Kringvarp Føroya (kvf.fo)
   - Undrast á, at Fiskimálaráðið ikki letur innlit | Kringvarp Føroya (kvf.fo)
   - Loysa nú frá posabandinum | Kringvarp Føroya (kvf.fo)

Samanumtikið eru serstakliga nógvar ítøkiligar ábendingar og ákærur, og so nógvur ivi reistur á løgtingi og í almenninginum um, hvørt avgerðir um 10-tals millardir krónur av virðum í Føroyum nú og komandi, yvirhøvur hava havt neyðugt lógargrundarlag, og hvørt fyrisitingin er farin fram lógliga, sakliga og rætt.

Tískil halda vit tað vera alneyðugt fyri eftirlit Løgtingsins, fyri rættartrygd og rættarkenslu og fyri framtíðar grundarlagið undir helst størstu virðum landsins, at málini verða kannað og lýst út í æsir av óheftum løgfrøðingi.

Vinarliga

Vegna Tjóðveldi, Javnaðarflokkin og Framsókn

Høgni Hoydal　　Aksel V. Johannesen　　Ruth Vang